# Føroyingar søgdu »ja« til grundlógarbroyting

Men vóru tað føroyingar, sum skuldu gjørt av, um gentubørn skulu hava sama rætt sum dreingjabørn at arva donsku trúnuna, so fall uppskotið við einum braki, tí einans 11,8% hava verið á vali. Tað er Ríkisumboðið í Føroyum, sum stendur fyri uppteljingini, og úrslitið hjá teimum vísir, at 3.607 fólk hava atkvøtt »ja«, meðan 481 hava atkvøtt »nei«.



*Jón Johansen í Havn segði, sum næstan øll hini, ja til grundlógarbroytingina*



*- Tað er reint rukkulív at rógva út í løtuni, soleiðis sum príslegan er, og soleiðis sum umstøðurnar hjá útróðrarmonnum annars eru vorðnar, sigur útróðrarmaður. Myndin er tilvildarlig*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

> .. eg var í bátinum í tilsamans 42 tímar, og tá avroknað varð, var mín partur 420 krónur. Hetta gevur eina tímaløn upp á 10 krónur um tíman. Hetta er reint rukkulív...
>
> (Útróðrarmaður)

> ... fyri okkum virkar tað, sum um virkini skiftast um at keypa. Hava teir í Gøtu brúk fyri brosmu 1, keypa teir hana – og so keypir Vaðhorn brosmu 2. Ein annan dag er tað øvut...
>
> (Útróðrarmaður)

at keypa. Hava teir í Gøtu brúk fyri brosmu 1, keypa teir hana – og so keypir Vaðhorn brosmu 2. Ein annan dag er tað øvut.

Hann sigur, at tað nyttar einki hjá teimum at seta minstaprísir á brosmu og longu, tí úrslitið verður bara, at eingin keypari er til fiskin – og so fer hann fyri næstan ongan pening kortini.

## Dýr søla

Útróðrarmenn eru eisini misnøgdir við, at tað er vorðið dýrari og truplari at selja fiskin um Fiskamarknað Føroya.

- Vit skulu av við umleið hálva aðru krónu fyri kilo tilsamans, og tað vísir seg, at tað alsamt gerst dýrari at sleppa av við fiskin. Byrjunargjaldið var 50 krónur. Nú hevur Landingarmiðstøð Føroya so lagt 75 krónur omaná. Aftrat hesum koma so prosentini fyri sjálva søluna. Er nøgdin av fiski lítil, gerast landingarútreiðslurnar lutfalsliga størri.

Eitt annað, sum útróðrarmenn eisini fýlast á, er, at Fiskamarknaður Føroya hevur sett nýggjar treytir og lagt nýggj gjøld omaná landingina, tá bátar landa uttanfyri vanligu dagtímarnar.

- Nú skulu vit ringja fyri klokkan 17.30 og boða frá landing, og vit skulu hava landað fyri klokkan 21 á kvøldi – og ikki fyrr enn klokkan 07 á morgni, tá eisini skal boðast frá frammanundan. Fylgja vit ikki hesum treytum, verður okkum álagt sektargjald, sum er einar 200 krónur.

Útróðrarmaðurin sigur, at samanumtikið er tað vorðið nógv dýrari at sleppa av við fiskin, og tá hetta er í eini tíð, har fiskiveiðan hevur verið vánalig, og fiskaprísirnir eru undir øll lágmørk, er eyðvitað, at tað í løtuni er sera trupult hjá monnum at fáa nakað sum helst burtur úr útróðri.

- Hevði tað verið sum vanligt, og fiskaprísirnir høvdu verið á eini leið, hevði nógvur útróður verið í dag, nú hvítingurin er komin upp í veiðina. Men, sum er, nyttar einki monnum at loysa, tí tað gevur snøgt sagt ongar pengar.

## Trupul ísing

Ein annan trupulleika, sum útróðrarmenn eisini renna seg í, er ísingin av fiskinum.

- Tað vísir seg at vera trupult at ísa fiskin soleiðis, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan vil hava hann at vera. Ísa vit fiskin, soleiðis sum vit halda, at hann skal ísast, er hann ov kaldur. Starvsstovuni dámar best, at fiskurin er millum hálva aðru og tvey plusstig, tá hann verður landaður, men tá halda vit, at hann gerst ov bleytur, meðan hann stendur inni á Fiskamarknaði Føroya.

Hann sigur, at útróðrarmenn hava roynt nógvar ymiskar hættir við ísing, men tað vísir seg at vera torført at byrgja upp fyri, at fiskurin ikki gerst ov kaldur, tá hann verður landaður – ella eisini gerst ov bleytur, áðrenn hann fer útaftur av Fiskamarknaði Føroya.

- Líkt er til, at einki hongur saman, sigur útróðrarmaðurin, sum Sosialurin hevur tosað við.

Sosialurin hevur eisini tosað við ein annan útróðrarmenn, sum man teljast millum teir heilt frægu í Føroyum. Hesin rekur ein størri glastevjabát, sum er mannaður við tveimum monnum.

Eftir trimum túrum herfyri gav hvør túrur heilar 5.000 krónur í halli. Pengur er ikki til rakstur av einum útróðrarbáti, ei heldur til hýru hjá monnum.